ALMANNA- OG BÚSTAÐAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

1. juni 2026
Mál: 26/13280-2
Tygara skriv: 52-113/2025
Viðgjørt: JAK

Nr. 52-113/2025

Svar uppá skrivligan fyrispurning nr. 52-113/2025 eftir tingskipanini § 52 a, frá Ruth Vang, løgtingskvinnu, settur landsstýriskvinnuni í almanna- og bústaðamálum, Margit Stórá, um avgerð um at flyta umlættingartilboð til Sands

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Tekur Almannaverkið til eftirtektar niðurstøðuna hjá Løgtingsins umboðsmanni, at avgerðin at flyta umlættingartilboð til Sands er ógildug?
2. Um ja, hvør er avleiðingin av, at avgerðin er ógildað?
3. Hevur ella fer Almannaverkið at bjóða avvarðandi foreldrum annað ella tillagað tilboð, sum livur upp til krøvini um eina framhaldandi tænastu av tí, sum var á Eirargarði ?

Svar

Til nr. 1

Álitið hjá Løgtingsins umboðsmanni frá 13. apríl 2026 viðvíkir fyrst og fremst tí eina barninum, sum fekk umlættingartilboðið flutt av Eirargarði til Sands.

Í álitinum er tað niðurstøðan hjá Løgtingsins umboðmanni, at av tí, at framhald ikki var í tænastuni hjá tí ávísa barninum, eftir at umlættingartilboðið varð flutt til Sands, endaði tænastan í roynd og veru, og tí átti Almannaverkið í veruleikanum at havt tikið fyrisitingarliga avgerð um tilboðið.

Í sambandi við hendan fyrispurningin havi eg fingið upplýst, at Almannaverkið hevur tikið niðurstøðuna hjá Løgtingsins umboðsmanni til eftirtektar og tískil er í gongd við at taka fyrisitingarliga avgerð viðvíkjandi umlættingartilboðnum hjá tí ávísa barninum. Almannaverkið er eisini í gongd við at meta um, hvørt aðrir borgarar, sum eisini fingu umlættingartilboðið flutt av Eirargarði til Sands, mugu metast at hava rætt til somu avgerðartilgongd.

Til nr. 2

Sí svarið til nr. 1.

Til nr. 3

Sí svarið til nr. 1.

Almanna- og bústaðamálaráðið, 1. juni 2026

Margit Stórá
landsstýriskvinna